

# Margretha drotning mundi fingið stóra oljuleið

Deil:

Jan Müller

01.08.2014 - 19:55

Oljan.fo

Hevði Statoil fingið sín vilja, hevði tann risastóra oljuleiðin Johan Sverdrup itið eitt annað navn í dag. Leiðin hevur navn eftir maninum, sum var tann fyrsti norski forsætisráðharrin, men tað var um reppið, at hon bleiv nevnd eftir Margrethu drotning.

Margretha var nevnliga millum nøvnini, sum Statoil kom við. Norska felagið hevur rættindini á leiðini saman við Maersk Oil, Petoro, Lundin Petroleum og Det norske oljeselskap.

Áðrenn ein oljuleið fær sítt almenna navn, stendur tað samstarvsfeløgunum frítt, hvussu tey nevna sínar leitibrunnar. Eitt nú æt Johan Sverdrup-leiðin upprunaliga Aldous og Avaldsnes. Leiðin var býtt sundur í tvey loyvi.

Tað er næstan einki mark fyri, hvat feløg kunnu finna uppá at nevna sínar leitibrunnar. Eitt nú hevur tað føroyska Faroe Petroleum brúkt tónleikanøvn sum Aerosmith og Eric Clapton.

Tá leiðin so skal hava tað endaliga navnið, skal tað góðkennast av myndugleikunum, og fyri trimum árum síðani gjørdi norska stjórnin av at broyta navnapolitikkin, soleiðis at tey meiri stuttligu ella lættisoppakendu nøvnini blivu vrakað. Ístaðin skuldu oljuleiðir hava nøvn, sum hava røtur í tí norska fólkastýrinum síðani 1844.

Sambært Teknisk Ukebrev høvdu hvørki Lundin ella Statoil skotið upp at kalla leiðina Johan Sverdrup. Uppskotið hjá Lundin var at geva henni navnið Nansen eftir tí kenda pólgranskaranum, meðan Statoil hevði uppskot sum Johan Castberg, Roald Amundsen og Margretha drotning.

Men norsku myndugleikarnir gjørdu av at velja navnið Johan Sverdrup, og soleiðis eitur leiðin, sum ætlandi fer undir framleiðslu í 2019.